# So varð valt

**Flogbóltssambandið endaði um vikuskiftið aðalfundin, sum annars byrjaði tann 29. mai**

FLOGBÓLTUR
*tíðindaskriv*

Á framhaldandi aðalfundi leygardagin var nevndarvalið í Flogbóltssambandinum endaliga staðfest.

Aðalfundur var upprunaliga 29. mai, men tá tað ikki eydnaðist at finna nakran at átaka sær formanssessin eftir at Niclas Joensen hevði boða frá, at hann ikki tók við afturvali, hevur verið arbeitt við at finna nýggjan formann.

Fyri umleið 14 døgum síðani játtaði Magnus Tausen at taka við formanspostinum, og var hann endaliga valdur leygardagin. Magnus sat longu undan hesum í nevndini, og tí var neyðugt at finna nýggjan nevndarlim. Her játtaði Kristianna Dam úr Kollafirði at taka við vali.

Triði nevndarlimurin er Trygvi H. Poulsen úr Klaksvík.



*Nevndin í Flogbóltssambandi Føroya, Kristianna Dam, nevndarlimur, Magnus Tausen, formaður og Trygvi H. Poulsen, nevndarlimur og kappingarstjóri*

Á aðalfundinum leygardagin var annars tosan nógv um at halda áfram við ungdómsarbeiðinum, venjaraútbúgvingini og um dómaraskeið.

Roknað verður við, at tað komandi ár verða 2 ungdómlandslið, men arbeitt verður fram ímóti at fáa 4 ungdómslandslið í aldursbólkunum U 17 og U 19 hjá bæði kvinnum og monnum.

Eisini skal miðjast ímóti av skipa fyri felagsvenjing fyri U-15 aldusbólkunum, men hetta skuldi ikki verða beinleiðis landslið, men heldur liknandi flogbóltsskúlum, sum ávíst tal av íðkandi kunnu luttaka í.

Komandi Oyggjaleikir á Hetlandi fingu eisini umrøðu, og formaðurin Magnus Tausen greiddi frá um leikirnar. Magnus var sera keddur um kostnaðarstøðið, sum eftir øllum at døma verður til hesar leikir. Dýra uppihaldið fer nevnliga helst at hava við sær, at talan verður um dýrastu leikirnar higartil.

Landskappingin í flogbóltinum byrjar 16. oktober, men longu 10 oktober verður fyrsta stóra steypakappingin í Havn - FK-kappingin. Vinnararnir av hesi kapping vinna sær rætt at leika í steypafinaluni, sum verður 12. februar 2005 í Høllini á Hálsi.

## Talvið hesa vikuna

Leko, P. (2741) - Kramnik, V. (2770)
World Championship
Brissago (1), 25.09.2004

1.e4 e5 2.Rif3 Rif6 3.Rixe5 (Russiska byrjanin) 3...d6 4.Rif3 Rixe4 5.d4 d5 6.Bd3 Ric6 7.0—0 Be7 8.c4 Rib4 9.Be2 0—0 10.Ric3 Bf5 11.a3 Rixc3 12.bxc3 Ric6 13.Re1 Re8 14.cxd5 Fxd5 15.Bf4 Rac8 (Langur vælkendur teorivariantur) 16.h3 Be4 (Vanliga verður Bf6 leikt. Kramnik roynir seg á egnum leiðum) 17.Be3 Ria5 18.c4 Rixc4 19.Bxc4 Fxc4 20.Rid2 (Idé´in við 18.c4. Men kramnik hevur eisini sæð langt) 20...Fd5 21.Rixe4 Fxe4 22.Bg5 Fxe1+ 23.Fxe1 Bxg5 24.Fa5 Bf6 25.Fxa7 c5! 26.Fxb7 Bxd4 (Ótrúliga torført hjá hvítum at vinna talvið, um ikki ógjørligt) 27.Ra2 c4 28.Re2 Red8 29.a4 c3 30.Fe4 Bb6 31.Fc2 (Hvítur stendur passivt, men hinvegin, hvat kann hann gera?) 31...g6 32.Fb3 Rd6 33.Rc2 Ba5 34.g4 Rd2 35.Kg2 Rcd8 36.Rxc3! (Rætti leikur. C-finnan má burturbeinast, annars er støðan tapt) 36...Bxc3 37.Fxc3 R2d5 38.Fc6 Ra5 39.Kg3 Rda8 40.h4 R5a6 41.Fc1 Ra5 42.Fh6 Rxa4 43.h5 R4a5 44.Ff4? (Faktiskt einasti feilurin í talvinum. Neyðugt var at býta h-finnuna av. Kramnik vísir okkum hví næstu leikirnar) 44...g5! 45.Ff6



Støðumynd eftir 45.Ff6

45...h6! 46.f3 (Hvítur missur frúnna eftir Fxh6? R8a6!) 46...R5a6 47.Fc3 Ra4 48.Fc6 R8a6 49.Fe8+ Kg7 50.Fb5 R4a5 51.Fb4 Rd5 52.Fb3 Rad6 53.Fc4 Rd3 54.Kf2 Ra3 55.Fc5 Ra2+ 56.Kg3 Rf6 (Soleiðis. Rókarnir skulu standa á f6 og f4, og svartur vinnur f-finnuna og talvið) 57.Fb4 Raa6 58.Kg2 Rf4 59.Fb2+ Raf6 60.Fe5 Rxf3 61.Fa1 Rf1 62.Fc3 R1f2+ 63.Kg3 R2f3+ 64.Fxf3 Rxf3+ 65.Kxf3 Kf6 0—1

# Kramnik vann fyrsta talvið

**HM-dysturin millum heimsmeistaran Vladimir Kramnik og avbjóðaran Peter Leko, fór av bakkastokki leygardagin. Fjúrtan talv skulu telvast**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Tað ringasta sum kundi henda fyri 25 ára gamla Peter Leko (2741) úr Ungarn, hendi: hann tapti tað fyrsta talvið, enntá við hvíta fólkinum. Hin fýra ára eldri Vladimir Kramnik (2770) leikti eina sokallaða nýggjheit í russisku byrjanini, har hann lat frúnna fyri rók og bisp. Við í offrinum fekk hann eisini eina frífinnu, sum argaði Leko nógv.

Kramnik telvaði sannførandi. Feskt byrjanarspæl, kalt miðspæl og millimetrapresist endaspæl. Tó eigur Leko eisini heiðurin fyri talvið. Hann gjørdi bert 1-2 smáir feilir, men tað hevur ein einfalt ikki ráð til ímóti Kramnik.

Leko leikti seg í HM-finaluna fyri tveimum árum síðani, tá hann vann Dortmund 2002. At tað er gingin so rúm tíð áðrenn hann endiliga slapp framat Kramnik, hevur sínar talvpolitiskar og fíggjarligar orsøkir. Fyri hálvum ári síðani varð endiliga greitt, at HM-dysturin fór at verða telvaður í Brissago, Sveis, í døgunum 25. septembur — 18. oktobur.

Vinnarin av hesum dysti hittur vinnaran av Kasparov-Kasimzhanov, sum helst verður leiktur einaferð í fyrru helvt av 2005. Tástani fáa vit ein heimsmeistara aftur, eftir at talvheimurin hevur verið í tvíningi seinastu ellivu árini. Tó eiga vit kortini at uppfata Kramnik-Leko dystin sum ein veruligan heimsmeistaraskap.

Fyrrverandi heimsmeistarin, Anatoly Karpov (2682), var heiðursgestur hjá fyrireikarunum í hesum fyrsta talvi. Karpov flutti fyrsta leikin hjá Leko, 1. e4, smeyg sær av talvpallinum og talvið kundi byrja. Karpov telvar lítið fyri tíðina, og tá hann tekur lut í kappingum, gongur tað oftani illa. Men 53 ár er eingin aldur fyri ein telvara og eiga vit tí ikki longu at blaka legenduna í gloymibókina. Hygg bert eftir Viktor Korchnoi, 73 ár. Á komandi altjóða ratinglista hevur hann aftur bart seg uppá 2600 í rating og harvið topp 100! Seinasta árið hevur Korchnoi nevnliga havt ca. 2570, men orkufrekur sum hann er, kann hann 1. oktobur aftur kalla seg 2600-telvara.

### Optimistiskur Leko

Hóast hann fekk keðiliga byrjanarlagnu sást tað als ikki á Leko, at hann nú hevur illtungt arbeiði fyri framman, um hann vil inn aftur í dystin. Fyri fýra árum síðani tapti Kramnik nevnliga einki talv í HM-dystinum ímóti Kasparov, men vann hinvegin tvey og leikti trettan javnleikir. Leko má vinna dystin fyri at kalla seg heimsmeistara, tá javnleikur 7-7 er nóg mikið hjá Kramnik at varðveita heitið.

Leko var smílandi eftir fyrsta talvið, tá hann hitti tíðindafólk. Tað var faktiskt hann sum prátaði mest av høvuðspersónunum báðum. Ein góður tapari. Sunnudagin sást tað eisini aftur á borðinum, tá Leko við svarta fólkinum leikti fløkt og optimistiskt. Hann vildi testa Kramnik, men russin var skjótur at bjóða Leko javnt eftir einans átjan leikum. Kramnik treivst helst ikki í opnu fløktu støðuni. Javnleikur við svørtum er altíð gott móti Kramnik og Leko takkaði fyri tilboði. Støðan er tí 1,5 — 0,5 til Kramnik. Tólv talv resta í.





*Føroyameistarar fyri gentur 14-17 ár. Standandi frá vinstru eru tað Unn Hansen, Jakoba Langaard (liðformaður), Lív E. Olsen, Ljubinka, Hansa Hansen, Henny Joensen, Poula Lassen, Heidi á Lakjuni, Katrin D. Petersen og Herman Jacobsen (venjari). Húkandi frá vinstru eru Eir Hansen, Heidi Sevdal, Ann Olsen, Birna Nielsen, Estrid Jensen og Elly L. Jóanessarson. Katrin H. Petersen manglar á myndini.*

# Meistarar úr Runavík

Eisini hjá teimum 14-17 ára gomlu gentunum er føroyameistarakappingin nú liðug. Her gjørdist úrslitið, at NSÍ vann kappingina.

Og einki er at ivast í, at tey í Runavík rokna nógv av liðnum komandi árini. Ikki minst tí tað eisini er so, at allar hava aldur til at taka lut í kappingini komandi árið, og hóast unga aldurin, so eru tvær teirra eisini at síggja á U-19 landsliðnum, sum í hesum døgum tekur lut í kapping í Pólandi.

# Átta dómarapør teknað til

**Nú eru kortini góð líkindin fyri, at nóg mikið av dómaraþørum fara at vera til hondbóltskappingina í vetur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Talan var annars um eina heilt akutta kreppustøðu fyri bara trimum vikum síðani, tá dómarafelagið eftir ætlan skuldi halda skeið fyri dómarunum. Eitt skeið, sum samstundis varð sett sum krav til teir dómarar, sum ætla sær at døma í bestu deildini í vetur.

Skeiðið varð í fyrsta umfari avlýst, men fyri at gera enn eina roynd á økinum, valdi dómarafelagið at royna enn einaferð, og avtala varð gjørd við Frank Smith, skeiðshaldara, at nýtt skeið skal haldast í døgunum beint undan kappingarbyrjan.

Og hetta – saman við neyðarrópinum – hevur eftir øllum at døma bøtt um støðuna. Í øllum førum eru boðini nú, at ikki færri enn áttta dómarapør hava boðað frá luttøku á skeiðnum, og teirra millum eru eisini onkur pør, sum ikki hava gjørt so nógv um seg áður.

Eitt nú fer Eyðun Samuelsen at døma saman við Andreas F. Hansen, eins og bæði Tjaldur og H71 í vetur verða skrásett við tveimum dómarapørum í part.

Umframt sjálva dømingina, sum ivaleyst er mest grundleggjandi uppgávan hjá dómarafelagnum, so verður eisini í løtuni arbeitt við at víðka um eygleiðaraskipanina, eins og ætlanin er at røkka longur út við boðskapinum um døming. Viðvíkjandi hesum seinasta, so er tað nú ætlanin, at skeið skulu haldast hjá ymsu feløgunum, soleiðis at áhugin fyri døming í størri mun eisini kann kveikjast hjá yngru leikarunum.


## Fimm lærlingar til Føroya Tele í Tórshavn

"Fyri summi eydnast alt, tí at teirra leið er løgd soleiðis. Flest onnur, sum fáa tingini at eydnast, gera tað tí tey hava avgjørt, at soleiðis skal tað vera"

Anatole France

**Søkt verður eftir fýra lærlingum í skrivstovuyrkinum, fyrisiting í Tórshavn skjótast gjørligt.**

Føroya Tele er eyðkent fyri sera fjølbroytt arbeiðsøki og harav eisini fjølbroytta starvsfólkasamanseting. Ynskið er, at ein læra á Føroya Tele skal mynda hetta, og tí vilja lærlingar okkara koma runt á ymiskar deildir í fyritøkuni. Tað er soleiðis ætlanin , at uml. helvtin av lærutíðini er í Teledeplinum í Niels Finsensgøtu, har deildirnar Kundatænasta, Avrokning og Kundaskrásting umframt Telebúðin húsast. Hesar deildir eru allar undir Marknaðardeildini.

Hin helvtin av lærutíðini verður í høvuðssætinum í Klingruni, har hesar deildir eru: Stjórnardeild, Marknaðardeild og Fíggjardeild umframt Tekniska Deild. Lærlingarnir fara í høvuðsheitum at verða knýttir at 4 deildum í eini turnusskipan – tó kann roknast við, eisini at skula á aðrar deildir í styttri tíðarbilum. Har tað er gjørligt, fara vit at seta lærutíðina saman í samráð við lærlingin.

**Søkt verður eftir einum lærlingi í goymsluyrkinum til Goymsluna í Klingruni.**

Lærlingurin verður knýttur at Goymsluni alla lærutíðina, men kann tó, fyri at víðka um heildarfatanina í mun til goymsluarbeiði á Føroya Tele, verða styttri tíðarskeið á øðrum deildum.
Arbeiðið á Goymsluni fevnir um goymslustýring, innkeyp, tolling o.a. vanligt goymsluarbeiði.

Til røttu fólkini hava vit nøkur sera spennandi lærupláss.

**Til læruplássini ynskja vit fólk við:**
- HF, students- ella HH-prógvi
- førleika at seta seg inn í nýggja tøkni
- evnum at samstarva við nógvar ymiskar samstarvsbólkar
- ídni at røkka ásett mál
- goymslulærlingurin má hava koyrikort

**Lærutíðin er:**
- 2 ár og 18 vikur við students- ella HF-prógvi
- 2 ár við HH-prógvi

Lønin er sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til Starvsfólkadeildina á tlf. 30 30 30.

Umsóknir skulu verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi týsdagin 12. oktober 2004 og skulu sendast til

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

**Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Fjarskiftisøkið mennist sera skjótt, og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja vera við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*


